ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 3. mars 2010

# Tey yngstu kappaðust í Havn

Um vikuskiftið var flogbóltskapping í Havn fyri tey yngstu liðini, har tilsamans um 300 børn vóru við. Í nøkrum av deildunum vórðu vinnararnir funnir, men í teimum eldru av teimum yngru deildunum verður bíðað við finalunum til leygardagin, tá stórur finaludagur verður í Trongisvági.

Eisini vóru 125 børn við í kappingunum í Kidsvolley, har øll eru vinnarar og eingin tapari. Tey fóru tó ikki tómhent heimaftur, tí tey fingu okkurt gott til góman og eina topphúgvu frá Eik.

TB átti tveir av vinnarunum í teimum báðum deildunum, ið blivu liðugt spældar. TB a vann gentur 10 ár framman fyri SÍ og TB b, og TB a vann dreingir 10 ár framman fyri Fleyr og Drátti a. Fleyr a vann gentur 12 ár, har Ternan a gjørdist nummar tvey og Fleyr b nummar trý, og hjá dreingjum 12 ár vann SÍ a framman fyri Ternuna og Fleyr a.

Gentur og dreingir 14 ár og kvinnu- og mansunglingar skulu leygardagin til Trongisvágs at spæla FM-finalurnar, ið eftir eru at avgreiða, og verða tær spældar á serliga flogbóltsgólvinum, ið eisini var brúkt til steypafinalurnar hjá teimum vaksnu. TB er vertur fyri tiltakinum, og sum skilst, verður nokk so nógv gjørt burturúr, so bæði spælarar og onnur skulu fáa ein góðan dag burturúr.

**hil**



**Gentur 12 ár**



**Dreingir 12 ár**



**Gentur 10 ár**



**Dreingir 10 ár**



**Kidsvolley level 1**



**Kidsvolley level 2**